# KÍ kiksaði enn eina ferð



*Ove Nysted varð fluttur fram í álopið til dystin móti B36. Her er hann í nærdysti við Trónd Vatnhamar og Fróða Clementsen. Málskjúttin Egil Zachariasen og Magni á Lakjuni fylgja við*

*Mynd: SáH*

**B36 fór við øllum, eftir at Tróndur Vatnhamar hevði bjargað brotssparki frá Hjalgími Elttør**

KÍ–B36

*Jóannes Hansen*

Verður tað eitt stríð fyri at sleppa burtur úr botninum. Tað var spurningurin, sum klaksvíkingar kundu seta sær sjálvum, eftir at teir høvdu verið vitni til fyrsta heimadystin í landskappingini í ár. Teirra lið hevði tapt. Teir hildu, at tað var gott, at tapið var ímóti B36, og at tað ikki hevði verið ímóti Skála. Tað hevði ikki verið at borið. Um tapið ímóti B36 verður at bera, valdast sjálvandi um, hvussu tað fer at tørna út komandi vikurnar.

Nú hevur KÍ tapt tríggjar ferðir á rað í bólkaumfarinum í steypakappingini, teir taptu síðsta sunnudag venjingardyst ímóti LÍF, og so taptu teir ímóti B36.

At tað ikki hevur hilnast, sum tað varð vónað og kanska eisini roknað við, tá tilfarið verður havt í huga, hevur havt við sær, at Kurt Mørkøre hevur gjørt royndir, og uppstillingin hesa ferð boðaði frá, at tað framvegis verður eksperimenterað. Hesa ferð var Ove Nysted fluttur úr miðverjuni og fram í álopið, meðan Alexander Djordjevic, sum bara hevur verið álopsspælari, síðani hann kom henda vegin fyri einum ári síðani, var miðverji. Og so var Harley Bertholdsen ikki í høgra, men í vinstra borði.

Alexander Djordjevic varð kosin besti KÍ spælarin, men hann var uppií, tá B36 fekk einasta málið í 1. hálvleiki. Hann royndi at spæla fram eftir miðásinum og á Hjalgrím Elttør, men John Petersen kom ímillum og lyfti inn um KÍ verjuni til Jákup á Borg, sum skoraði.

## Endurtøkur

Tá B36 vann FM í fjør hevði tað stóran týdning, at teir fingu alt, tá teir í 16. umfarinum vóru í Klaksvík. Ta ferðina vóru tað Egil Zachariassen og John Petersen, sum skoraði málini í 2–1 sigrinum.

Egil og John vóru aftur málskjúttar fyri B36 hesa ferð, men fyrst javnaði KÍ miðskeiðis í 2. hálvleiki. Innleggið kom úr høgru, og Heðin á Lakjuni, sendi úr sjey metrum við høvdinum upp í hornið aftanfyri gamla liðfelagan, Trónd Vatnhamar.

Eitt sera vakurt mál frá Heðini, sum longu í 1. hálvleiki sendi bóltin í málið. Hann varð við diagonalbólti úr høgru spældur púra leysur, streyk ímóti málinum og skoraði, men dómarin brikslaði fyri rangstøðu. Allan Mørkøre, sum var passivur í høgru, var í rangstøðu. Tað vóru klaksvíkingar ikki glaðir fyri.

Egil Zachariassen stútaði B36 upp á 2–1. Magni á Lakjuni legði fríspark innfyri úr høgru, og miðverjin stóð púra einsamallur, tá hann setti krúllin undir bóltin.

John Petersen skoraði eisini við høvdinum. Bárður Mortansson, sum varð innskiftur eftir steðgin, legði innfyri, og aftanfyri handara stólpan setti John høvdið undir bóltin, sum í boga sigldi omanfyri málverjan.

## KÍ trýst

Klaksvíkingar góvu ikki skarvin yvir, hóast støðan var 3–1. Bárður á Lakjuni varð skiftur inn. Hann hevði eina góða roynd dygst við síðuna av stólpanum, og so fekk hann brotsspark, tá Egil Zacharissen nært beinini hjá honum.

Hjalgrím Elttør, sum hesa ferð var sentralur miðvallari, sendi úr ellivu metrum til høgru fyri seg sjálvan, men Tróndur Vatnhamar lá flatur og bjargaði frágera væl.

Kurt Mørkøre skifti seg sjálvan inn fyri Allan Mørkøre, sum var álopsspælari og hevði havt fleiri góðar royndir, og Kurt átti sín lut í síðsta málinum. Hann tamdi við bringuni til Ova Nysted, sum heilfluktaði framvið B36 málverjanum. KÍ trýsti síðstu løtuna, men B36 reið stormin av.

## Stóðu royndina

B36 sigurin var kærkomin. Eftir lúsingin í fjórðingsfinaluni í steypakappingini ímóti HB høvdu B36 menninir brúk fyri staðfesting av, at tað ikki stóð heilt illa til.

Uppstillingin var eitt sindur øðrvísi, enn hon plagar at vera, og tað riggaði væl. KÍ var ágangandi, men B36 hevði kanska betri tak á spælinum. John Petersen og Jákup á Borg arbeiddu væl á miðvøllinum, og teir vóru støðugt vandamiklir stuðlar hjá Áka Mørk, sum var einsamallur á toppinum.

Arnbjørn Danielsen var í útgangsstøðuni í høgra verjuborði, har setningurin var at steðga Heðini á Lakjuni. Tá Heðin eftir steðgin varð settur í høgru, býttu Magni á Lakjuni og Arnbjørn Danielsen um pláss, og hóast Heðin alla tíðina var ein støðug hóttan, so greiddi Arnbjørn sín setning væl.

B36 hevði undan kappingarbyrjan bæði FM heitið og steypasigurin at verja. Tað er longu greitt, at teir fara ikki at verja steypasigurin. Um teir fara at verja FM heitið valdast um, hvussu tað fer at skerjast tær næstu seytjan ferðirnar í landskappingini. Men sigurin í Klaksvík var góður botnur at sláa undir.

KÍ droymdi undan kappingarbyrjan um at vera við, har tað gongur fyri seg. Teir sleppa ikki í ólavsøkufinaluna, sum teir vóru annar parturin av í fjør. Tapið ímóti B36 ger, at klaksvíkingar mugu hugsa um at koma á talvuna, áðrenn teir fara at droyma stórar dreymar.

KÍ: Meinhardt Joensen – Erling Fles, Alexander Djordjevic, Allan Joensen, Harley Bertholdsen – Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør, Jan Joensen, Heðin á Lakjuni – Allan Mørkøre, Ove Nysted

B36: Tróndur Vatnhamar – Arnbjørn Danieslen, Fróði Clementsen, Egil Zachariassen, Jens Kristian Hansen, Magni á Lakjuni – Jákup á Borg, Din Sando, Kenneth Jacobsen, John Petersen – Áki Mørk




*Kenneth Jacobsen eltir Hjalgrím Elttør, sum brendi brotsspark, tá støðan var 3-1. Tá KÍ endiliga minkaði um munin var tað ov seint*

*Mynd: SáH*



2. deild: ÍF – KÍ 8-1

# ÍF gav KÍ av grovfílini

**Tað gjørdist til stórsigur, tá ÍF tók ímóti KÍ í Fuglafirði. Klaksvíkingar fóru yvir fjørðin við einum 8-1 tapi, og tað man raka meint hjá KÍ. ÍF kann hinvegin frøast um eina avbera góða byrjan í landskappingini**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Fuglfirðingar gjørdust júst ov stuttir í fjør, tá liðið endaði á triðja plássi aftanfyri TB og Skála. Í ár er ætlanin hjá teimum at enda hægri á stigatalvuni enn í fjør.

Og byrjanin til hesa kappingina kundi neyvan verið betri. ÍF vann heili 8-1 á KÍ, sum ikki hevði tað stóra at bjóða uppá. Tó so at sum fyrri hálvleikur gekk, so hevði eingin varhugan av, at tað fór at enda við stórsigri.

ÍF kom á odda eftir bert tríggjar minuttir við máli sum Eyðálvur Petersen skoraði. Hann fekk fatur í einum langum bólti úr høgru síðu. Hann kom at standa leysur í vinstru síðu í brotsteiginum, og hóast málverjin, sum var komin út ímóti, fekk hondina á bóltin, so snikti hann seg innum.

Eftir hetta leikaði javnt á í báðum endum, men móti endanum av fyrra hálvleiki legði ÍF sjógv ímillum. Verjuleikarin Mortan Thomsen økti til 2-0, tá hann breyt ígjøgnum í vinstru síðu. Hann fór framvið tveimum verjuleikarum, áðrenn hann langaði til, og bólturin fór inn við nærmastu stong.

Tveir minuttir seinni kundi Rúni Petersen økja við brotssparki, og tá misti KÍ mótið til seinna hálvleik.

## Fýra mál í átta minuttir

Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik økir Rúni Petersen til 4-0. So kom stígur í málskjótingina eina løtu, men so bragdaði aftur smáar tjúgu minuttir seinni.

Tá fekk ÍF fýra mál innanfyri átta minuttir. Tey málini skutu Heini Heinason (2), Rúni Petersen og Eyðálvur Petersen. KÍ kom tó á máltalvuna áðrenn dystarlok. Tað var Olgar Danielsen, sum hevði síðsta fótin á og minkaði um munin.

Hetta var tó bert eitt troystarmál, og ÍF fekk fyrsta sigurin í ár til høldar. Hetta boðar frá góðum, og kanska kann ÍF vera ein kandidatur til uppflytingina í ár. KÍ má hinvegin taka sær um reiggj, um liðið framhaldandi skal hava umboðan í 2. deild.

**Dysturin í tølum:**

**ÍF – KÍ 8-1 (3-0)**

1-0: Eyðálvur Petersen
2-0: Mortan Thomsen
3-0: Rúni Petersen
4-0: Rúni Petersen
5-0: Heini Heinason
6-0: Eyðálvur Petersen
7-0: Heini Heinason
8-0: Rúni Petersen
8-1: Olgar Danielsen

# Hvidovre enn eitt tap

**Óli Johannesen var ikki við, tá liðið hjá honum tapti á útivølli í Kolding, og nú tykist Farum av álvara at vera á veg í superliguna**

1. DEILD DANMARK

*Jóannes Hansen*

Óli Johannesen var ikki við, tá felagið hjá honum, Hvidovre IF, enn eina ferð legði rygg til tap. Hesa ferð vóru teir í Kolding, har heimaliðið vann 3–1. Støðan í hálvleikinum var 1–0.

Óli Johannesen hevur verið plágaður av skaða í fótinum, men nú verður roknað við, at hann skjótt verður tøkur aftur. Eingin ivi er um, at Hvidovre hevur brúk fyri Óla. Støðan er alt annað enn góð, og álitið í miðverjuni skal vera við til at tryggja, at Hvidovre ikki flytir niður.

At Køge og Farum fara at flyta upp í bestu deildina gerst alt meiri sannlíkt. Køge hevur áður verið fleiri ferðir í bestu deidlini, og teir hava eina ferð vunnið meistaraskapin. Farum hevur ongantíð verið í bestu deildini. Tað var ikki fyrrenn nú so nógv umrøddi Peter Brixtofte setti í seg, at býurin hjá honum skuldi hava eitt fótbóltsflaggskip í bestu deildini, at tað fór at ganga rætta vegin, og nú er Farum á gáttini til superliguna.

Hesa ferð høvdu teir vitjan av Randers Freja. Tað var spenningur í alla tíðina, og Farum vann bara 1–0. Men tey trý stigini vóru kærkomin.

Síðani nógvir av superligu spælarunum hjá Lyngby fluttu til Farum hevur fyrrverandi Lyngby venjarin, Poul Hansen, verið ítróttarstjóri í Farum, meðan fyrrverandi AB og FCK venjarin, Christian Andersen, hevur verið venjari. Tað hevur ofta verið frammi, at tað bara var ein spurningur um tíð, áðrenn Poul Hansen fór at gerast venjari, og at Christian Andersen fór at fáa sekkin. Men nú bendir ikki serliga nógv á, at tað skal gangast soleiðis. Donsku fjølmiðlarnir vistu í gjár at siga, at Poul Hansen er upp á tal sum venjari hjá AGF. Um hetta verður veruleiki er ikki minst treytað av, um AGF megnar at varðveita plássið í bestu deildini.

Køge hevði vitjan av AC Horsens. Úrslitið var 1–0, og harvið er Køge framvegis oddalið. Seinastu árini hava teir onkra ferðina havt beina kós ímóti bestu deildini, og so hava teir kiksað í síðstu løtu. Einki bendir á, at tað hesa ferð skal gangast teimum soleiðis.

Herfølge er framvegis á aldukambinum, sum teir hava riðið á síðstu vikurnar. Hesa ferð vunnu teir 3–1 í Århus ímóti AC Århus. B93 hevur fingið stig fleiri ferðir upp í slag. Hesa ferð megnaðu teir 1–1 í Odense ímóti B1913. Tað var eitt gott úrslit hjá B1913. Fredericia hevði vitjan av hinum árstalsfelagnum í Odense. B1909 legði rygg til 3–0 tap ímóti Johan B. Hansen og Fredericia.

HFK Sønderjyllandi og Frem vóru leingi við í uppflytingarstríðnum. Nú eru vónirnar hjá hesum báðum feløgunum heilt kámar. Frem vitjaði í Sønderborg, og teir vórðu sendir aftur til Valby við 2–0 tapi.




Nú ber til at seta samanspardu eftirlønina í virðisbrøv. Møguleiki er fyri at keypa láns- og partabrøv og íløguprógv, ella at fáa gjørda eina serliga íløgusamanseting.

Um tú vilt hava gjøllari upplýsingar um 60-ára konto ella Lutakonto, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við starvsfólk bankans.

Í Føroya Banka fært tú holla ráðgeving um virðisbrøv, og hvussu júst tín íløga kann setast saman.

FØROYA BANKI